DAGSINS MEINING

Trúvirðið í vanda

Røða amerikanska forsetans var ivaleyst eitt vónbrot hjá øllum teimum, sum vónaðu, at hann fór at áseta ein dag fyri afturtøkuna av amerikansku hermonnunum úr Irak. Amerikanska hersetingina av Irak er vorðin ein kleppur um beinini á USA, og alt fleiri fólk úti um heima eru farin at stúra fyri gongdini. Støðan í Irak líkist alt meira støðuni í Vietnam, har amerikanska hersetingin endaði við eini katastrofu fyri USA.

Forsetin legði í røðu síni um Irak stóran dent á at seta eitt fólkaræðiligt stýri á stovn í Irak. Hetta er sjálvsagt gott og væl, og eingin kann hava nakað ímóti einum slíkum hugsunarhátti. Trupulleikin er bert, at henda tilgongd skal setast í verk í einum samfelag, sum ongantíð í søguni hevur havt fólkaræði. Hartil kemur, at demokratiið skal koma frá einum hersetingarvaldi — einum hersetingarvaldið, sum milt sagt ikki ber seg at, sum ein kann vænta av einum stati, ið nevnir seg demokratiskan at vera. Ræðuleikarnir, sum amerikanskir hermenn fremja móti irakiskum fangum, standa jú í andsøgn til alt tað góða og positiva, sum amerikanarar siga seg vilja gera í Irak. Hugsað verður um fólkaræði, búskaparlga framgongd, oljuríkidømið til fólkið o.m.a.

Skal USA varðveita sítt trúvirði sum framherji fólkaræðisins í Irak og í heiminum sum heild, noyðist amerikanska stjórnin at taka annað skinn um bak og fara undir at rudda upp í millum sínar egnu úti sum heima. Skil má fáast uppá hervaldið í Irak og Busch má skilja seg av við teir ráðharrar og toppembætismenn, ið hava ábyrgdina av teimum ræðuleikum, sum í navni fólkaræðisisn verða framdir í Irak og í øðrum londum, har USA hevur stóra ávirkan.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Einsamallur til fremmant land

Elsa Blicher Christiansen
Skopun

Nú havi eg sæð, hvat fólk, sum eru púra køld og kensluleys, kunnu finna uppá. At senda ein lítlan fimm ára gamlan drong til eitt fremmant land púra einsamallan. Uttan at kenna nakran. Uttan at kenna málið. Hann verður sum ein deyvstummur á einari fremmandari klótu.

Øll síggja vit, at hann er í ónormalum hondum, sum bert vilja nýta sína megi, nú teir endiliga hava fingið makt yvir einum lítlum verjuleysum barni.

Hann, lítli Petur, hevur sanniliga havt trupulleikar nokk í sínum stutta lívi. Latið okkum forða fyri, at slík terror hendir her hjá okkum. Latið okkum, sum hava følilsi, royna at verja lítla Petur móti kyniskum menniskjum.

Hvør er næsti tín, Sólrun

Elisabeth Myllhamar

Tað er altíð gott, at fáa eitt herðaklapp, eg havi ongantíð áður skrivað eitt lesarabrøv, tað býður mær hart ímóti, men eg føli meg at hava skyldu til at gera eina viðmerking til hetta sparkið, hetta viðkemur jú okkum øllum tjóðveldisfólkum, eisini her í bygdini, tað kemur sum eitt sjokk fyri meg, eg sum veit, at vit tjóðveldisfólk altíð hava verið so positiv.

Eg skilji ikki hvat endamálið við einari sovornari útspilling er av ósekum fólki, tú sigur at vit øll tjóðveldisfólk hava gjørt okkum fyri skommum, men ikki nær og hvar, tað er ein ógvuliga grov ákæra móti so nógvum persónum, tú skal minnast til eitt, at tað verður ímillum 25-30 fólk her í bygdini til síðsta val, eg haldi ikki at øll hesi vilja hava hetta sitandi á sær. Tað kann ikki kastast tær og mær fyri, at ein politikkari aðrastaðni í Føroyum ger eina viðmerking um, at systemið ikki riggar, fyri tað kann ein ikki loyva sær, at trakka ein heilan flokk niður í lortin.

Tað hoyrist ikki nakað frá tykkara politikkarum, teir eru nokk blivnir fyri tykkum, sum tey heilagu neytini í India, síðan teir komu í samgongu.

Skal eg vera púra erlig, et hetta lesarabrævið hjá tær ikki borðbært at senda út í hvønn krók í Føroyum, av einum slíkum persóni sum tær.

Ja, Sólrun, sum tú sjálv sigur stendur í Jákup brævið:

Tungan er lítil í vavi, men tá hon fer til verka, kann hon fáa nógv frá hondini og sjálvdan verður tað til uppbyggjan av sál og likami.

Sig so ikki, at biblian ikki kann brúkast til alt, bæði at byggja upp við og bróta niður, bara hon vendir tann rætta vegin.

ARBEIÐSMARKNAÐUR
á www.portal.fo
Leys størv, sum verða lýst í Sosialinum, kunnu leggjast út á
www.portal.fo
so øll hava møguleikan at síggja lýsingina

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Ræðandi tubbaksinnflutningur

Heðin Thomsen

Hagtølini um innflutningin av tubbakki vísa, at nýtslan hevur verið á nøkulunda sama støði síðan 1995 roknað pr. íbúgvara eldri enn 15 ár. Tó vísa nýggjastu tølini, at innflutningurin er øktur í fjør.

Tiltøkini higartil so sum upplýsing, forboð móti royking á nøkrum almennum støðum, nøkrum arbeiðsplássum og innan almennu ferðsluna, hava so ikki fært minkandi nýtslu við sær.

Hetta undrar ikki, tí trongdin hjá vanliga roykjaranum at roykja er so sterk, at hesi »bleytu« tiltøkini muna onki. Tað skulu nógv strangari og effektivari tiltøk til.

Fyribyrging móti tubbaksroyking kann bítast í fleiri partar:

1) **Tiltøk, sum eru ætlað at seta í verk yvir fyri roykjaranum.** Her verður hugsað um forboð móti royking á ávísum støðum, ávís tíðarbil á degnum. Hesi tiltøk kunnu minka tubbaksnýtsluna hjá roykjaranum eitt sindur, um tað er fultkomið bann í viðkomandi bygningi, so at hann noyðist heilt útum at roykja. Eisini verja hesi tiltøk ikki-roykjaran móti passivum royki á staðnum.

Men hóast tað er lítið av praktiskari fyribyrging í hesum tiltøkum, so hava tey ein virðismiklan symbolskan týdning við tað, at tey signalera, at royking verður av tí almenna mett sum skaðilig og má ikki fara fram á almennum støðum, og at ikki-roykjarin, sum er meirlutin av fólkinum, hevur fyrstarætt til fríska luft, har sum hann kemur. Um tað almenna er konsekvent í hesum politikki, kann tað sum frálíður vera við til at venda hugburðin. Um tað almenna sjálvum (altso megna at geva sær sjálvum ein kaldan turkara) eru roykfrí eftir einum ári. Um ein keypir nikotintyggigummi ella onnur nikotinhjápievnir og fær vegleiðing frá heilsustravsfólki í nýtslu av hesum, so hepnast hjá uml. 10% at halda sær eftir einum ári. Besta tilboðið til roykjaran eru tey sokallaðu roykiavvenjingarskeiðini, antin í bólkum ella sum einstaklingar. Hetta er í veruleikanum atburðarpsykologisk viðgerð, sum fer fram hjá útbúnum roykiavvenjara í einum tíðarskeiði uppá 5 vikur. Eftir tílík skeið eru tað í mesta lagið 30%, sum eru roykfrí eftir einum ári.

Haraftrat kemur, at tað signalerar bæði-og (at royking er bannað, men kortini loyvd) verður trúviðrið av tiltøkunum oyðilagt. Tað er tí sera umráðandi, at tað almenna ikki setur serlig hølir og kvadratmetrar av til roykjarar at roykja í. Tað verður heilt nátúrliga uppfatað sum stuðul til roykingina fyri skattborgarans pening, og fær ikki tubbaksnýtsluna at minka.

Onnur tiltøk yvir fyri roykjaranum er tilboð um hjálp til tey, sum ætla at leggja av: Tað finnast ongar lættar loysnir á hesum økinum.

Um roykjarin ikki søkir sær hjálp, eru møguleikarnir fyri at leggja av sera smáir. Bert 3 - 5% av teimum, sum leggja av av sær sjálvum eru sera fá av teimum 13.200 roykjarunum í Føroyum, sum brúka hendan møguleikan.

Hypnosa og akupunkturur eru nyttuleys.

Samanumtikið kann sigast, at tiltøk yvir fyri roykjaranum eru lítið effektiv (lítil cost-benefit), hetta kemur av, at nikotinið er eitt sera tørvelvandi evni, og bundinskapurin so sterkur, at tað stóra fleirtalið av roykjarunum keypur og brúkar tubbaksvøruna óansað. Men tiltøkini eru tó ikki heilt nytturleys og skulu fremjast samanvið teimum meira effektivu tiltøkunum, sum verða umtalaði niðanfyri.

2) **At forða fyri at ung byrja at roykja.**
At byrja at roykja er eitt ungdómsfyribrygdi. Tey allarflestu byrja í 14 - 15 ára aldrinum, tá tey eru ótrygg og trilvandi viðvíkjandi nógvum av lívsins fyribrygdum.

Sum er, eru tey í einari ørkymlandi tvístøðu:

Tann vantandi fyrimyndin. Tey hoyra ein boðskap um skaðan av royking og at ein skal lata vera, men tann sosiali veruleikin, sum tey uppliva, sigur teimum nakað annað: Meira enn helmingurin av børnunum búgva saman við foreldrum, har annar ella bæði roykja. Onnur av teirra idolum roykja: ítrottarleiðarar, prestar, læknar, lærarar, politikarar, nevndarformenn.

Fyri at geva børnunum ein annan hugburð til hendan trupulleikan (og misnýtslu sum heild), er neyðugt, at skúlin er tann stabila fyrimyndin og teirra kelda til vitan um evnið.

Undirvísing í skúlunum um vandan við royking og aðrari evnismisnýtlu eigur at byrja longu í 1. flokki, tá børnini eru móttakilig. Vit kunnu kalla hetta fyri »tidlig indgriben«. Tá tey eru byrjað at roykja, er ov seint.

Ein onnur ørkymlandi støða, sum tey uppliva, er tann, at vøran er til sølu men má ikki brúkast.

Tey uppliva søluna sum eina blástempling. »Tá tað er loyvt at selja, má tað merkja, at tað er í lagi at keypa og brúka tað« ??

Aldursmarkið fyri at kunna keypa tubbak eigur tí sjálvandi at setast upp til minst 18 ár. Fyri at kunna halda hetta aldursmarkið og fyri at frítaka kioskir og sølubúðir fyri trupulleikan at ansa eftir aldrinum hjá nógvum av kundunum, hevði verið best at tikið tubbakssøluna úr detailhandli og selt tubbakkið í einari einkarsølu sum t.d. kundi itið »Rúsdrekka- og tubbakkssøla landsins«. Harvið høvdu vanlig handilsfólk eisini kunna havt ungfólk undir 18 ár í arbeiði uttan at hugsa um aldursmark fyri keyp/sølu av nakrari vøru.

Av tí at skaðarnir av royking ikki byrja at vísa seg, fyrr enn roykjarin hevur roykt eini 20 - 40 ár, kunnu vit ikki rokna við, at hendan fyribrygingin fer at ávirka sjúkuhagtølini enn á sinni. Hon skal fremjast sum ein »langtíðar-investering«, ið fer at geva avkast um ein mannsaldur.

3) **Regulering av marknaðinum og marknaðarføringini av tubbakki.**
Her verður farið eftir bóltinum (vøruni) ístaðin fyri at fara eftir manninum (roykjaranum).

Effektiv fyribyrging kann útynnast her við hjálp av teimum røttu lógunum, kunngerðunum og reglugerðunum, og tað nýtist ikki at kosta eitt klovið oyra.

Faktiskt kundu vit loyst trupulleikan skjótt og effektivt við einari lóg, sum var so stutt sum 1 paragraff við einum stykki. Her verður sjálvandi hugsað um fullkomið bann móti innflutningi og sølu av tubbakki. Men tíverri er ikki parlamentariskur meirluti fyri hesum enn, so vit noyðast fyribils at arbeiða stig fyri stig fram móti nullhugsjónini (at eingin doyr ella fær álvarsligan skaða av royking).

a) hækkan av aldursmarkinum og einkarsøla er nevnt omanfyri.
b) bann móti reklamu, her má eisini setast bann móti reklamering (framsýning) av vøruni inni í sølubúðunum.
c) príshækkan er eitt effektivt og gott amboð. Fyri hvørji 10%, sum vøran dýrkar, minkar nýtslan uml. 4%. Við at hækka avgjøldini stigvíst, kann nýtslan minkast uttan at landskassin missir inntøku. Sum er, er tubbaksvøra alt ov bílig í Føroyum.
d) ávaringartekstir á pakkarnar, ES hevur kravt sjónligar, stórar ávaringartekstir á pakkarnar, hesum eiga vit eisini at fylgja.
e) fullkomna vørulýsing. Sum er, er bert kravt at framleiðarin/innflytarin upplýsir innihaldið av tjóru, nikotini og kolsúrevni. Brúkarin átti, sum við aðrari nýstluvøru, at fingið upplýst hvørji onnur evnir, sum kunnu vera skaðilig, eru í vøruni. Sum er, er heldur ikki kravt at upplýst verður um øll íblandingarevnir, eitt nú aromaevnir, sum eru ætlað at gera vøruna vælsmakkandi og attraktiva.

Men er tað ikki skeivt at royna at fyribyrgja roykingini? Hava vit ikki hvør sær avgerðarrætt yvir okkara egna lívi. Tað kann ikki vera skeivt at roykja, bara tað ikki gongur út yvir onnur?

Svar:

Øll hava avgerðarrætt yvir sínum egna lívi og avgera, um tey vilja liva ella doyggja. Men hvør kann siga: »Eg leggi onki í um eg doyggi sum 55 ára gamal, tað avgeri eg sjálvur. Um konan gerst einkja og børnini faðirleys og samfelagið missir milliónir er mær líkamikið.« Er tað ábyrgdarkensla?

Hví er tað lógarkravt at nýta trygdarbelti í bili?? Tað er so ikki fyri at fyribyrgja at ein skaðar onnur í ferðsluni.

Hvat verður tað næsta?? Skulu vit banna sodavatni, fleskasteik, burgarum???

Svar:

Nei. Ein sodavatn, ein karamella, ein grøn keks eru óskaðilig.

Matur er neyðugur fyri at kroppurin skal liva og maturin (eisini feitt og góðgæti) er óskaðiligur, tá hann verður nýttur á rættan hátt, t.v.s. í einari passandi javnvág millum fiti, eyggjahvítaevnir, og sukurevnir.

Eisini er umráðandi ikki at eta ov nógv tilsamans.

Ferðslan er eisini neyðug fyri at samfelagið skal fungera. Hon er heldur ikki vandamikil, um ein brúkar bilin rætt og koyrir varisliga og heldur ferðslureglarnar. Ein knívur ella ein stólur ella ein trappa eru heldur ikki vandamikil, um ein lærir at nýta tey rætt.

Tubakkið harafturímóti er tann einasta loyvda nýtsluvøran, sum, tá hon verður brúkt eftir forskriftunum, drepur tann, sum brúkar hana ella ger hann álvarsliga sjúkan. Tað er ein áltavgerandi munur.

Tað finnst eingin tryggur máti at roykja uppá, um so var kundu vit sagt:

»Royk tú bara, men ger soleiðis ella soleiðis, so at tú ikki fær skaða av tí.«

Hermann uttan høvd

Rolf Guttesen
25.05.2004

»Færingerne ved ikke, hvad de skal bruge bloktilskuddet på 1 milliard kroner til, så det er bedst at fjerne det helt«.

Nakað soleiðis málbar Hermann Oskarson seg í tíðindasendindini á Danmarks Radio á P2, klokkan 7.02 í morgun, týsdag 25. mei 2004. Hermann er sum kunnugt formaður í »Færøernes Økonomiske Råd«, sum spikarin segði.

»De ved ikke hvad bloktilskuddet skal bruges til, og derfor eksporteres det videre til udlandet«

Jamen? Hvat er tað maðurin sigur? Er tað ikki landshúsarhaldið ella - kassin, sum fær blokkin? Fer hann ikki til at dekka millum annað sjúkahús, sosialmál og annað, sum kostar nógvar pengar? Meinar Hermann at móttakarin, Landsstýrið, ikki brúkar pengarnar, men »eksporter dem videre til udlandet?« Hann má vita tað! Hvar sendir Landsstýrið (í loyndum?) pengarnar? Hava vit ikki fyri stuttum hoyrt um, hvussu ringt tað var at fáa endarnar at røkka saman á fíggjarlógini?

»Nogen gange er der for lidt, men andre gange er der for meget«

Hvussu hetta svassið skal skiljast, veit eg ikki. Antin er tað bara »platt«, almindligheitir, sjálvfylgjur. Sum í einum og hvørjum kommunukassa, statskassa ella firmakassa eru góðar og ringar tíðir. Sovorðið platt er einki argument í orðaskiftinum um blokkpengarnar ella Ríkisfelagsskapin. Ella tað er partur av framhaldandi fullveldisterrorismu. Nú hava teir mist Landsstýrissessin, nú skal bara saboterast og spillast so nógv sum gjørligt.

»Det kan slet ikke styres«

So, so. Hvat hava vit økonomar (búskaparfrøðingar) til? Hvat hava vit eitt Búskaparráð til? Búskaparráðið hevur netupp til uppgávus at fylgja við í búskaparligu gongdini, royna at geva politikarunum góð og væl undirbygd ráð (sambært grein 3 í lógini) um, hvussu føroyski búskapurin sum heild skal stýrast? Var ikki eisini onkur politiskur flokkur, sum tosaði um »neyva stýring«?

»Hovedet på blokken«

Hetta er tápuliga heitið á einum tiltaki á Christiansborg í dag, sum sonevndi Norðuratlantsbólkurin skipar fyri. Hetta er eitt samarbeiði millum Høgna Hoydal og tveir grønlendingar. Her letur ein av Føroya hægst settu búskaparfrøðingum seg brúka til at framføra anti-føroyska nonsens-talu. Enn einaferð seta vanligir danskarar spurningin, um føroyingar eru eitt serliga idiotiskt fólkaslag? Summatíðir gevi eg teimum rætt!